

*Sviar í Føroyum góvu Jøran Persson pennahaldara, sum var gjørdur úr einum ryggjageisla av grindahvali*

# Göran fekk pennahaldara av hvali



*Ann-Kristin Nilsson, forkvinna í Føroysk-Svenska Felagnum handaði Gøran Persson blómur*

**Ein ryggjageisli av hvali til pennahaldara. Tað var gávan, sum sviar í Føroyu lótu Görani Persson á samkomuni í Miðlahúsinum leygardagin**

VITJAN
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Leygardagin høvdu sviar, búsitandi í Føroyum, høvi at hitta svenska forsætismálaráðharran, Göran Persson á samkomu í Miðlahúsinum í Vágsbotni.

Formaðurin í felagnum, Ann-Kristin Nilsson, handaði forsætisráðharranum blómur og segði nøkur orð um nýggja svensk-føroyska felagið í Føroyum.

Siðani handaði Mikael Green Görani Persson eina gávu, sum var ein pennahaldari, sum hann sjálvur hevur gjørt úr einum ryggjageisla av grindahvali.

Hóast tað kundi hugsast, at onkur symbolikkur var í hesum - at geva honum gávu úr hvali, so var tað kortini ikki so, sigur Ann-Kristin Nilsson.

Á vitjani hjá Görani Persson nýtti Jóannes Eidesgaard, løgmaður m. a. høvi at greiða honum frá grindadrápi og tí neyðuga í, at vit í Føroyum liva av tí, ið havið gevur - og at vit halda okkum røttu megin javnvágina við burðardyggari veiðu.

Svensk-Færøisk Forening í Føroyum varð stovnað í maimánaði, og var hetta tiltakið fyrsta almenna uppgávan hjá felagnum.

Felagið hevur slakar 40 limir. Av teimum eru eisini nógvir føroyingar, sum eitt nú hava búð í Svøríki ella á einhvønn hátt hava samband við Svøríki.

Næsta tiltakið hjá felagnum verður Kräftskiva

Í Føroyum búgva millum 25 og 30 svenskir ríkisborgarar.

## Umrøddu eisini Evropa og framtíðina

VITJAN
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

– Sjálvandi hevði eg eisini Evropa og framtíðina í bakhøvdinum undir vitjanini hjá Göran Persson. Svøríki var limur í EFTA til 1995 og hevur síðani verið limur í ES. Göran Persson hevur tí hollar og stóra vitan um øki.

Jóannes Eidesgaard vísir á, at Göran Persson er ein klókur maður, og tí meldar hann ikki út beinleiðis, hvat hann heldur, at vit skulu gera.

– Men hann bað um tíð at hugsa um hetta, og skuldi hann venda aftur til mín. Eingin ivi er um, at hann hevur havt sítt skepsis við ES, men dugir væl at síggja teir fyrimunir, sum Svøríki hevur við at verða limur í ES. Vit skulu minnast til, at tað tók teimum 20 ár meira enn hjá dønum at taka støðu ES-limaskapin.